# Hevði væntað meira av Tjóðveldi

**Sámal Matras Kristiansen, samfelagsfrøðingur, heldur, at nýggjasta veljarakanningin hjá Fynd staðfestir ta gongd, sum hevur verið seinastu mánaðirnar. Tað kemur tó óvart á hann, at Tjóðveldi missir ein tinglim. Hinvegin var væntandi, at sambandið fór at standa seg væl, og at teir smáu flokkarnir fóru at hava framgongd. Afturgongdin hjá Fólkaflokkinum hevur eisini ligið í kortunum**

VELJARAKANNING
*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*



- Tað undrar meg stórliga, at Tjóðveldi ikki stendur seg betur í hesi kanninginni. Sum tann stóri andstøðuflokkurin burdi flokkurin havt eina lítla framgongd ella í minsta lagi varðveitt tingmannatalið, sigur Sámal Matras Kristiansen, samfelagsfrøðingur.

- Úrslitið hjá Tjóveldi er í veruleikanum sera skuffandi. Hetta er meira ella minni ein fiasko hjá flokkinum. Tað sær út til, at Tjóðveldi hevur mist pustin nú ímóti endanum av valstríðnum, sigur Sámal Matras Kristiansen og vísir á, at Tjóðveldi hevur ligið á átta ella níggju tinglimum í teimum seinastu kanningunum.

Óvissan í kanningini er tó, at Javnaðarflokkurin situr á tí 33. sessinum, men ein lítil broyting kann hava við sær, at Sambandsflokkurin ella Tjóðveldi fáa tað 33. mandatið ístaðin.

Hann leggur afturat, at Tjóðveldi herfyri bert fekk 30 prosent av atkvøðunum í einari kanning av næmingum í Hoydølum, men at hetta talið plagar at liggja um eini 40 prosent.

Annars heldur samfelagsfrøðingurin, at kanningin er ein staðfesting av teimum kanningum, sum hava verið seinastu mánaðirnar. Úrslitið av kanningini var sostatt tað, sum vit høvdu væntað frammanundan, tó við nøkrum smáum frávikum.

### Jacob Vestergaard ger kanónval

Í tí persónliga atkvøðubýtinum er tað rættiliga óvæntað, at Jacob Vestergaard gerst tann stóri vinnarin. Hann fær 14 prosent av atkvøðunum, meðan formaðurin Jørgen Niclasen fær 8,3 prosent, sum er tað sama, sum tað sterka kvinnuliga valevnið hjá Fólkaflokkinum, Annika Olsen, fær.

- Hetta er ikki ein góð kanning fyri formannin í Fólkaflokkinum, men tað sær út til at Jacob Vestergaard verður løntur av suðuroyingum fyri at flyta Strandferðsluna til oynna. Harumframt verður hann eisini mettur sum ein martýrur av fleiri veljarum, eftir at løgmaður sendi hann heim úr landsstýrinum, sigur Sámal Matras Kristiansen.

Annars er tað merkisvert, at Bjarni Djurholm, Óli Breckmann og Poul Michelsen allir hava trupult við at vinna seg upp millum tey valdu á fólkaflokslistanum.

Hjá Sambandsflokkinum eru Magni Laksáfoss og Edmund Joensen teir stóru profilarnir, og tað var óivað væntandi, eftir at hesir báðir hava verið sera markantir í fjølmiðlamyndini seinasta árið. Formaðurin Sambandsflokksins stendur sambært hesum at fáa triðflestar atkvøður á sambandslist-anum.

Á javnaðarlistanum er líkt til at Helena Dam á Neystabø fer at gera comeback í politikki. Gerhard Lognberg liggur á triðjaplássi á javnaðarlistanum, og tað kemur óvart á Sámal Matras Kristiansen.

Teir stóru tapararnir sambært hesi kanningini eru Heðin Mortensen og Kristian Magnussen, sum ikki koma uppá listan við sjey teimum fremstu.

Kári á Rógvi sær út til at gerast tað nýggja stjørnuskotið hjá Sjálvstýrisflokkinum. Hann fær ein lítlan triðing av atkvøðunum, meðan formaðurin og einsamalli tinglimurin, Kári P. Højgaard, fær 7,2 prosent av atkvøðunum. Kári P. Højgaard liggur tó í harðari kapping við Hans Blåsvær, Sámal Petur í Grund og Rúnu Sivertsen um annaðplássið í flokkinum.

### Smáu flokkarnir duga at profilera seg

Framgongdin hjá teimum smáu flokkunum var ikki óvæntað.

- Miðflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin hava dugað væl at fanga populer mál, sum hava stungið seg upp seinastu tíðina, sigur Sámal Matras Kristiansen. Her sipar hann m.a. til málið um 266 b og til kjakið um undirsjóvartunnil til Sandoynna.

Hann leggur afturat, at gamla valskipanin var við til at forða teimum smáu flokkunum í at fáa størri undirtøku.

- Teir smáu flokkarnir kundu áður ikki gera vart við seg í teimum smáu valdømunum, tí at hesar atkvøðurnar ofta fóru til spillis, men nú kunnu teir appellera til veljarar kring alt landið, og tað sæst aftur í hesi kanningini, sigur Sámal Matras Kristiansen.

Framgongdin hjá teimum smáu flokkunum kann vera orsøkin til, at Fólkaflokkurin gongur so markant aftur.

- Orsøkin til afturgongdina hjá Fólkaflokkinum kann vera, at flokkurin er kroystur av hesum báðum flokkunum. Fólkaflokkurin er ein breiður flokkur við einum liberalum og einum konservativum vongi. Tí kann Fólkaflokkurin missa virðiskonservativar veljarar til Miðflokkin og liberalar veljarar til Sjálvstýrisflokkin, sigur Sámal Matras Kristiansen.

### Karsten aftur á odda

Karsten Hansen fekk eitt sera gott fólkatingsval, og hendan gongdin heldur fram.

- Tað er sera óvæntað, at formaðurin í Miðflokkinum, Jenis av Rana, er á triðja plássi hjá Miðflokkinum. Her síggja vit tendensin frá fólkatingsvalinum ganga aftur, har Karsten Hansen er tann nýggi sterki maðurin hjá Miðflokkinum, sigur Sámal Matras Kristiansen.

Hann leggur afturat, at Miðflokkurin er blivin ein virðiskonservativur, sosialur loysingarflokkur, har Karsten Hansen umboðar loysingaraspektið í flokkinum.

# Eingin miðsavning hóast eitt valdømi

| | Fólkafl. | Sambandsfl. | Javnaðarfl. | Sjálvstýrisfl. | Tjóðveldi | Miðfl. | Miðnámsfl. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Norðstreymoy | 1 (2) | 1 (0) | (1) | | (1) | 1 (0) | |
| Eysturoy | 1 (1) | 2 (2) | 1* (1) | 1 (1) | 1 (1) | 1 (1) | |
| Norðstreymoy | 1 (1) | 2 (1) | 1* (0) | | (1) | | |
| Suðurstreymoy | 1 (2) | 1 (2) | 3 (2) | 1 (0) | 5 (3) | 1 (1) | |
| Vágar | 1 (1) | 1 (1) | | | | | |
| Sandoy | | | 1 (1) | | 1 (1) | | |
| Suðuroy | 1 | 1 (1) | 2 (2) | | (1) | | |

** Í Javnaðarflokkinum endaðu Andreas Petersen úr Eysturoyar valdømi og Hans Pauli Strøm úr Norðstreymoyar Valdømi javnir á aftasta plássi, og tí er ivi um, hvat valdømi fær seinasta sessin á Lista C.*

**Øll tey gomlu valdømini fáa sambært nýggju veljarakanningini á leið somu umboðan. Spádómurin um eina miðsavning, eftir at Føroyar eru vorðnar eitt valdømi, tykist tí ikki gerast veruleiki**

VELJARAKANNING
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Síðani Føroyar gjørdust eitt valdømi, hava dómadagsprædikurnar um eina eirindaleysa sentralisering verið nógvar. Og ein tann mest spennandi parturin av valúrslitinum 19. januar er, hvussu landafrøðiliga býtið verður millum teir 33 nýggju tinglimirnar.

Sambært nýggju veljarakanningini heldur spádómurin um eina miðsavning ikki. Øll sjey valdømini, sum vóru undir tí gomlu skipanini, fáa sambært kanningini á leið somu umboðan á ting.

Sum tað framgongur á talvuni, varðveita Suðuroyggin og Sandoyggin sínar ávikavist fýra og tveir tingsessir. Einasta valdømi, sum gongur aftur, er Norðoyggjar, sum missir ein sess, og einasta valdømi, sum gongur fram, er Suðurstreymoy, sum fer úr tíggju upp í 12 tingsessir.

Einasta ivamálið er millum Norðstreymoyar valdømi og Eysturoyar valdømi, við tað at ivamál er um, hvaðani sjeynda og seinasta umboð á javnaðarlistanum kemur. Andreas Petersen úr Eysturoy og Hans Pauli Strøm, sum er uppstillaður í Norðstreymoy, liggja nevniliga á jøvnum við 2,9 prosent av atkvøðunum, og tí liggja hesi bæði valdømini og togast um ein sess, sum kann gera, at Norðstreymoy kann fara úr trimum upp í fýra, meðan Eysturoyggin fer úr sjey niður í seks sessir. Men hetta er eitt einstakt mandat, sum broytir lítið uppá yvirornaðu myndina.

Samanumtikið bendir veljarakanningin á, at nýggja skipanin við einum valdømi ikki fer at broyta stórvegis uppá landafrøðiligu umboðanina, tá nýggja tingið er mannað leygarkvøldið tann 19. januar.

# Kvinnurnar tvífaldast

**Sambært nýggju veljarakanningini fer talið av kvinnum úr trimum upp í sjey tingsessir. Tjóðveldi og Javnaðarflokkurin eiga tríggjar í part, og Fólkaflokkurin eigur eina.**

VELJARAKANNING
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Helena Dam á Neystabø, Katrin Dahl Jakobsen og Nita Næs úr Javnaðarflokkinum. Annita á Fríðriksmørk, Bjørt Samuelsen og Bergtóra Høgnadóttir úr Tjóðveldi. Og Annika Olsen úr Fólkaflokkinum.

Hesar sjey kvinnurnar fara sambært nýggju veljarakanningini at vera partur av nýggja løgtinginum eftir 19. januar. Størsti flokkurin við átta sessum, Sambandsflokkurin, fær sambært kanningini onga kvinnu ting, og tað fáa teir báðir smáu, Miðflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin, heldur ikki.

Í dag sita tríggjar av 32 kvinnum í tinginum, Annita á Fríðriksmørk, Heidi Petersen og Lisbeth L. Petersen, og tað er níggju prosent av samlaðu umboðanini. Í nýgg-ju veljarakanningi fer kvinnuumboðanin upp í 21,2 prosent.

### Tær tryggu

Annita á Fríðriksmørk, Helena Dam á Neystabø, Annika Olsen og Bjørt Samuelsen tykjast sambært nýggju veljarakanningini at hava beina kós ímóti tinginum. Bæði Annita og Helena liggja einsamallar á øðrum plássi í ávikavist Tjóðveldi og Javnaðarflokkinum eftir formenninar Høgna Hoydal og Jóannes Eidesgaard. Annita fær 13 prosent av atkvøðunum í Tjóðveldi, og Helena fær 8,7 prosent av atkvøðunum í Javnaðarflokkinum. Annika Olsen í Fólkaflokkinum liggur á einum býttum øðrum plássi saman við formanninum Jørgen Niclasen. Bæði fáa tey 8,3 prosent av fólkafloksatkvøðunum aftanfyri toppskúttan Jacob Vestergaard.

Og til seinast tykist nýggja valevni Bjørt Samuelsen at standa sterk. Hon liggur á triðja plássi í Tjóðveldi við 6,6 prosentum av atkvøðum floksins.

### Tær ótryggu

Katrin Dahl Jakobsen, Nita Næs og Bergtóra Høgnadóttir eru sambært hesi veljarakanningini millum ytstu mandatini í ávikavist Javnaðarflokkinum og Tjóðveldi. Katrin og Nita eru ávikavist á fimta og sætta plássi í Javnaðarflokkinum við 3,6 og 3,2 prosentum av floksatkvøðunum, og Bergtóra Høgnadóttir er á fimta plássi í Tjóðveldi við 3,2 prosent av atkvøðunum.

Hesi úrslitini skulu sjálvsagt takast við fyrivarni, og tað er vert at leggja sær í geyma, at flestu veljararnir svara "veit ikki", tá teir verða spurdir, hvat valevni fær teirra kross. Tað merkir, at nógv kann broytast tann 19. januar.

Men sambært hesi kanningini bendir kortini á, at nógva kjakið um og kampanjan fyri øktari kvinnuumboðan í føroyskum politikki fer at geva úrslit til komandi løgtingsval.

**Valfundur í kvøld**
*Sosialurin og Rás 2 skipa fyri politiskum valfundi í Sjónleikarhúsinum í Havn í kvøld klokkan 20-22. Evnið er »Vælferð«. Fundurin verður sendur beinleiðis á Rás 2.*